Sumba illa fyri



Christian Høgni Jacobsen og li›felagarnir fingu vaska› stórtapi› móti B36 av sær, tá teir sunnudagin hølva›u sumbingar av

Mynd: Jonhard Hammer

Næstseinasta vónin hjá sumbingum brast eftir einans 24 sekundum, tá teir sunnudagin vitja›u í Runavík

JÁKUP MØRK

NSÍ-Sumba 6-1 (2-0)
Sumba kom til Runavíkar vi› gó›um vónum, men umframt vónirnar, høvdu teir nærum eitt krav um stig hangandi oman yvir sær, longu á›renn dysturin var byrja›ur.

Á ni›asta sessinum vi› einum stigi upp til bjargingina, var sjálvandi alney›ugt hjá sumbingum at fáa stig burturúr, men ta› var skjótt, at tankarnir fóru at sveima á lægri stø›i.

Vi› buldur og brak

Ta› tók nevnliga runavíkingunum einans 24 sekund, so var bólturin í netinum fyri fyrstu fer›. Hetta hendi eftir at Sumba (!) hev›i givi› bóltin upp. Gert Langgaard vann bóltin i høgru, og tá hann sendi innfyri, kom Dánjal Hansen rennandi og langa›i bóltin í neti›.

Ta› kann annars nevnast í hesum sambandi, at ta› júst var móti Sumba, at Dánjal av fyrstan tí› var› markna›arførdur sum áleypari í fremstu deildini. Í tí dystinum gjørdi hann ikki færri enn f‡ra mál.

Næsta máli› bí›a›i heldur ikki leingi, tí seks minuttir seinni lá bólturin aftur í sumbiarmálinum. Sjúr›ur Jacobsen sendi ein bólt inn í brotsteiginum, og har kundi Ian Højgaard sera hegnisliga leggja bóltin í meskarnar vi› høvdinum.

Ikki meira enn byrja›ir máttu sumbingar sostatt ásanna, at her var tap í hendi. Fram til klokkan runda›i hálva tíman kundu runavíkingar eisini havt økt væl meira um lei›sluna, men hvørki Christian Høgni Jacobsen ella Eddie Mikkelsen vóru nóg neyvir.

Móti endanum av hálvleikinum var eisini um reppi›, at sumbingar fingu minka› um munin. Serliga var ta› í dey›bóltsstø›um, at teir vóru vandamiklir, og ta einu fer›ina small eitt skot upp undir tvørstongina og út aftur í spæl. Sumbingar vildu vera vi›, at bólturin støkk ni›ur innanvert málstrikuna, men mál var› so ikki dømt.

Sama søgan

Runavíkingar byrja›u seinna hálvleik á sama hátt sum fyrra.

Jónsvein Petersen var í hálvleikinum settur á vøllin fyri Eddie Mikkelsen, og fyrstu fer› hann nam vi› bóltin, spurdist mál burturúr.

Naka› seinni var› Jónstein aftur upp á spæl, ta Ian Højgaard stakk bóltin inn um til kvika mi›vallaran.

Eftir at hava misn‡tt fleiri gó› tilbo›, slapp Christian Høgni endiliga á máltalvuna, tá hann slapp púra leysur móti málverjanum.

Seinasta máli› átti Christian Høgni eisini vi› hú› og hár. Sonni L. Petersen slapp ígjøgnum høgrumegin. Hann sendi bóltin flatt inn til Christian Høgna, sum finta›i eitt skot, og fleiri sumbingar tveittu seg í roydnini at verja fyri. Ísta›in fyri at skjóta, spældi Christian Høgni bóltin snildisliga ví›ari vi› hælinum, og ótarna›ur kundi Ian Højgaard seta bóltin í neti›.

Seinastu løtuna tóku runavíkingar sær av løttum, og sumbingar kundu eisini minka um munin, tá Bibi at kalla ótarna›ur kundi renna ígjøgnum verjuna, á›renn hann sendi framvi› málverjanum.

Vónin um endurtøku

Vi› ósigrinum eru sumbingar í at kalla somu stø›u, sum teir vóru í fyri einum ári sí›ani.

Ta› fer›ina megna›i Sumba í seinastu sekundunum av kappingarárinum at tryggja tilveruna, tá teir á Ei›inum í Vági skora›u sigursmáli› móti VB.

Hesu fer› ve›ur ta› HB, sum er mótstø›uli›i›, og megna sumbingar at gera ein seinasta vørr, er als ikki óhugsandi, at størsti fagna›urin fyri hetta kemur av Ei›inum, har tey helst eru farin í holt vi› at gera klárt til gullveitslu.

NSÍ-Sumba 6-1 (2-0)
1-0 Dánial Hansen 1
2-0 Ian Højgaard 7
3-0 Jónstein Petersen 46
4-0 Jónstein Petersen 63
5-0 Chr. Høgni Jacobsen 65
6-0 Ian Højgaard 70
6-1 Spasojé Biberdzic 76

Dómari:
Suni Johansen (SÍF)

NSÍ:
Rúni Joensen – Kári Hansen, Arnfinn Langgaard, Djóni N. Joensen, Sjúr›ur Jaobsen – Gert Langgaard, Brynjálvur Nielsen, Eddie Mikkelsen – Dánjal Hansen, Christian Høgni Jacobsen.

Sumba:
Fró›i Mortensen – Bergur Vinther, Marlon Kjærbo, Nicola Biberdzic – Hallur Dam Joensen, Jan Poulsen, Spasojé Biberdzic, Sasa Tomajék, Mortan úr Hørg – Eirikur Joensen, Nebosje Veljkovic.

GÍ í gamla lagnum

Spæli› hjá GÍ minti í tr‡ korter um gulltí›ina mi›skei›is í nítiárunum, og ta› var ivaleyst til at buka vágamenninar

JÁKUP MØRK

GÍ-FS Vágar 5-1 (4-0)
Hóast vágamenn høvdu vóna›, at teir kundu fáa okkurt burtur úr dystinum í Sarpisger›i sunnudagin, so nytta›i teimum líti› at vera ónødgir eftir dystin.

Ta› var nevnliga fult og heilt uppibori›, at GÍ vann dystin, og úr Gøtu frættist, at spæli› í fyrra hálvleiki mundi vera ta› besta, sum gøtumenn hava víst hetta kappingarári›.

Óventa› hør› mótstø›a

Vágamenn høvdu annars ikki rokna› vi›, at gøtumenn fóru at spenna seg naka› serligt í dystinum. GÍ hev›i so avgjørt einki at spæla fyri, anna› enn ærduna, og tí royndu gestirnir seg vi› sama framrætta›a útgangsstø›i, sum var› n‡tt fyri viku sí›ani móti B71.

Hesu fer› eydna›ist hetta tó ikki at koppa mótstø›uni, tí til tess var munurin alt ov stórur. Ta› bøtti heldur ikki um hjá vágamonnum, at Ari Thomassen sat leikbanna›ur á beinkinum, me›an Tór-Ingar Akselsen framvegis ikki er komin fyri seg eftir drúgva li›bandsska›an. Júst teir bá›ir hava annars veri› mest sjónligu leikararnar hetta kappingarári›.

Gekk skjótt gali›

Longu eftir tveimum minuttum fekk GÍ lagt seg odda, og tó at máli› kanska var naka› heppi›, var í veruleikanum bert ein vegur eftir hetta.

Úr 25 metrum royndi Súni Olsen seg vi› frísparki, og tá bólturin bar vi› mótstø›uleikara á vegnum, var Remi í málinum fullkomuliga seldur.

Máli› tók naka› av mótinum frá gestunum, samstundis sum gøtumenn nú fingu fri› yvir seg sjálvar, og vi› kvikum samanspæli› fóru teir nú í holt vi› at taga› gestirnar sundur.

Lei›slan var› tvífalda›, tá Poul Henning Jacobsen banda›i seg ígjøgnum verjuna. Vágamenn sóu sær eingi onnur rá› enn at taka beinini undan gøtumanninum, og Súni Olsen var ósvikaliga tryggur av 11 metra blettinum.

3-0 máli› kom eftir eina vælkenda GÍ dygd, sum tíverri hevur veri› alt ov sjáldsom hetta kappingarári›. Henning Jarnskor, sum als ikki hevur havt sama leiklut í ár sum undanfarin ár, slapp heilt oman at baklinjuni, og inni undir málinum var Óli Hansen fyrstur á innlegginum.

Vágamenn kundu neyvan gera anna› enn at hyggja at, tá máli› til 4-0 var› skoti›. Frískpark var úr høgru, og tá Súni sendi ein perfektan bólt inn um verjuna, kundi Bartal tveita seg fram og kanónstúta bóltin í meskarnar.

Henning Jarnskor leikti meira sannførandi, enn hann hevur gjørt meginpartin av árinum, tá GÍ endiliga vísti sonnu dygdir sínar

Mynd: Jonhard Hammer

Fer›in ni›ur

V› tryggu lei›sluni í skjáttuni, er einki at siga til, at fer›in á spælinum dala›i nógv eftir ste›gin.

Vágamenn royndu at gera sær dælt av, at heimamenninir nú tóku sær av løttum, og fyrsta korteri› av seinna hálvleiki mundi vera frægasta løtan hjá gestunum.

Ta› var eisini her, at teir fingu minka› um munin, tó at máli› neyvan kann troysta naka› serligt. Máli› kom, tá Birgir Joensen brádliga slapp leysur av GÍ verjuni. Hann dróg eina fer›, á›renn hann langa›i til, og umvegis fótin hjá Leivi, fór bólturin strúkandi í máli›.

GÍ fekk tó aftur seinasta or›i›, tá Henning kr‡ndi eitt got avriki vi› at senda bóltin í neti› vi› høvdinum, eftir eitt sindur av aftur og fram í brotsteiginum.

Vandin lúrir

Vágamenn kunnu sostatt í hvussu so er siga farvæl til vónina um at sleppa sær upp um sandoyingar á stigatalvuni, og merkir hetta, at teir í besta føri fáa tveir dystir móti næstbesta li›num í a›ru deild.

Munurin ni›ur til Sumba er tó bert eitt stig, og tá Sumba er betri, tá ta› ræ›ur um innanh‡sis dystir, skulu vágamenn helst hava stig í seinasta dystinum, sum er móti KÍ.

Gamaní skal ikki roknast vi›, at sumbingar gera ta› stóra móti HB í seinasta dystinum, men hinvegin hava teir sunnast í Føroyum á›ur s‡nt at treiskni eisini hevur nógv at siga, tá talan fellur inn á fótbólt. Ikki minst tá ta› ræ›ur um at yvirliva.

GÍ-FS Vágar 5-1 (4-0)
1-0 Súni Olsen 2
2-0 Súni Olsen 15 (br.)
3-0 Óli Hansen 20
4-0 Bartal Eliasen 43
4-1 Birgir Joensen 61
5-1 Henning Jarnskor 75

Dómari:
Jens Petur Brattalí› (VB)

GÍ:
Hallur Hansen – Pól Ennigar›, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Hans Pauli Petersen, Poul Henning Jacobsen, Jóan Petur Olsen, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen, Súni Olsen, Óli Hansen.

FS Vágar:
Remigius Mikocionis – He›in Joensen, Zylvanius Zudis, Ey›finn Fjalsbak – Kim Poulsen, Hannus Olsen, John Johansen, Rimvydas Bakus – Sonni Johansen, Birgir Joensen, Igoris Kirillovas.

KÍ gjørdi sína skyldu



Hóast KÍ einki hev›i at spæla um uttan æruna, so vóru teir nóg uppsettir til at vinna øll stigini móti illa manna›u sandoyingunum

Sandoyingar vóru illa manna›ir, og He›in á Lakjuni var væl upplagdur á heimali›num

KÍ-B71 2-1 (2-0)

Klaksvíkingar hava ikki veri› tryggir vi› gongdina hjá teirra li›i í ár. Teir hava aftur og aftur veri› vónbrotnir, og tí vóru teir ikki helt álvuligir, tá teir sunnudagin fóru til sí›sta heimadystin.

Men hóast KÍ einki hev›i at spæla um uttan æruna, so vóru teir nóg uppsettir til at vinna øll stigini móti illa manna›u sandoyingunum. Spæli› var einki at rópa hurrá fyri, men í løtum vístu klaksvíkingar, at teir hava fín fótbóltsevnir.

Vit nevndu í sí›stu viku, at Rógvi Jacobsen var farin til Noregs. Hetta er ikki rætt. Rógvi var í álopinum ímóti sandoyingum. Hann fer av landinum í dag, og nú skal hann royndarvenja vi› Sogndal í eina gó›a viku. So fæst at síggja, um hann ver›ur yrkisspælari uttanlands, um hann fer at gera n‡ggja avtalu vi› KÍ, ella um hann fer at spæla a›ra sta›ni í Føroyum komandi kappingarár.

Hjá B71 kom ta› illa vi›, at fleiri av lyklaspælarunum ikki vóru klárir. Bæ›i Julian Floresco og Michael Jørgensen royndu at hita upp, men bá›ir fóru undan dystvikur. Nú var hann komin aftur av skúlafer› í Danmark, og so var hann vongverji í høgru, har hann skuldi ansa eftir He›ini á arbyrjan av aftur vøllinum, tí teir ikki kendu seg at vera eitt hundra› prosent klárar. Spurningurin var kanska, um teir vildu leggja so ógvuliga nógv fyri. Ta› ráddi ivaleyst heldur um at síggja, hvussu ta› fór at roynast hjá hinum botnli›unum. Um ta› fór at ver›a ney›ugt, so var ta› t‡dningarmiki› at hava allar kanónirnar tøkar, tá NSÍ leygardagin kemur su›ur. Úrslitini sunnudagin gjørdu, at B71 komandi leygardag ikki skal spæla fyri lívinum í bestu deildini.

Hjá B71 var dreingjali›sspælarin Rúni Joensen í álopinum saman vi› Høgna Hansen. Hetta var fyrsta fer›in, at ungi ma›urin, sum hev›i Anrdzej Pazek sum beinlei›is mótstø›umann, var vi› frá fyrsta bríksli. Jón Brekku var á mi›vøllinum, har hann skuldi taka sær av fyrrverandi B71 manninum, Marek. Bæ›i hjá Jón og Rúna var talan um stórar og torførar uppgávur.

Hans Jørgen Djurhuus hevur veri› burtur í fleiri vikur. Lakjuni. Lakjuma›urin tykist av álvara at vera komin fyri seg aftur, eftir at ta› aftaná summarfrítí›ina hevur veri› eitt sindur strilti› hjá honum.

Málini

KÍ hev›i fleiri stórar málmøguleikar, og klaksvíkingar fingu í 1. hálvleiki tvey mál. Sandoyingar høvdu ikki nógvar málmøguleikar. Teir høvdu onkrar royndir, sum ikki vóru serliga vandamiklar. Tá teir at enda minka›u um munin var so lítil tí› eftir, at sigurin hjá KÍ ikki var› hóttur.

He›in á Lakjuni setti hol á vi› fínum einmans avriki. Í 9. minutti setti hann fer› á í vinstru, sneiddi tríggjar av sær, og setti bóltin framvi› Valdemar Nowisci, tá hesin kendi seg noyddan at fara úr málinum.

Undan ste›ginum stúta›i Ove Nysted umvegis stólpan og í kassan. Uppspæli› í høgru var gott millum Harley Bertholdsen og Arnold Joensen, sum yvirlappa›i, á›renn hann sendi inn til nærra stólpan, har Ove Nysted var fyrstur á.

B71 pynta›i um, tá bara ein lítil løta var eftir. Eli Hentze, sum alla tí›ina var› væl ansa›ur av Jan Joensen, sendi frískpark úr høgru og til handara stólpan, har Bjørn Thorsteinsson stakk seg fram og stúta›i úr rættuliga spískum og í handaru sí›una av málinum.

Tá hev›i KÍ framt fleiri útskiftingar. Hjalgrím Elttør er ein av ungu monnunum, sum hevur fingi› nógva dystarvenjing í bestu deildini. Hann kom á vølin saman vi› Símuni Waag Høgnesen og Ey›uni Klakstein.

jh

KÍ:
Zoltan Kojundrzic – Jan Andreassen, Andrzej Pazek, Niclas Niclassen – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Marek Vierczbicki, He›in á Lakjuni – Arnold Joensen, Ove Nysted, Rógvi Jacobsen.

B71:
Valdemar Nowisci – Bergleif Sólsker, Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen – Hans Jørgen Djurhuus, Jón Brekku, Eli Hentze, Kári Nielsen, Bjørn Thorsteinsson – Høgni Hansen, Rúni Joensen.

Teir næstbestu hava gott stev

2. deild:
KÍ vann sannførandi sigur á TB, sum harvi› misti møguleikan fyri 1. deildarfótbólti komandi ár

KÍ-TB 5-1 (3-1)

Úrsliti› í Klaksvík leygardagin kundi bent á, at ta› er alstórur munur á fótbóltsstø›inum í Klaksvík og á Tvøroyri. Bestu tvørámenninir taptu 5-1 ímóti teimum næstbestu klaksvíkingunum. Ta› átti at sagt alt.

Men munurin er neyvan so stórur. Sannleikin er, at næstbesta li›i› hjá KÍ hevur veri› sera sannførandi eftir summarste›gin. Og tá besta li›i› ikki hevur sta›i› seg serliga væl, er spurningurin, hvussu stórur munurin hev›i veri›, um teir í bestu deildini høvdu spælt landskappingardyst ímóti teimum í næstbestu deildini.

Á KÍ li›num vóru John Ryan, Tomislav Sivic, Allan Joensen og fleiri ungir og sera evnaríkir spælarar, t. d. Atli Danielsen, Jóhannes Færø og Símun Joensen, og í málinum høvdu teir Meinhard Joensen.

Tvørámenn vóru bragdligir fyrstu løtuna. Eftir hornaspark fingu teir bóltin í neti›, men dómarin kolldømdi, tí hann helt, at frískpark var gjørt ímóti KÍ málverjanum. Í næsta álopinum fekk Bogi Johannesen, sum nú er fluttur aftur úr Danmark, mál. Og talan var um eitt fínt mál. Av vongverjanum í vinstru sneiddi hann framvi› fleiri, á›renn hann setti framvi› KÍ málverjanum.

TB hev›i bóltin ikki so líti›, men teir vóru ikki so vandamiklir frammanfyri málinum, sum klaksvíkingar vóru ta›. Stóri spælarin hjá KÍ var Tomislav Sivic, sum eftir summarste›gin aftur og aftur hevur víst, at hann er ein fínur fótbóltsspælari (alt ov gó›ur til 2. deildarfótbólt).

Sivic átti uppleggi› til útjavnandi máli›, sum KÍ fekk skjótt aftaná, at TB hev›i sett hol á. Allan Joensen skora›i úr seytjan metrum, eftir at Frí›in Ziskason hev›i snitta›.

Allan Joensen var vi› í nógvum ta løtuna, hann var á vøllinum. Eftir uppspæl frá Tomislav Sivic leg›i hann úr brotsteiginum KÍ framum, og so var› hann rikin av vøllinum fyri hevnisøku. Tomislav Sivic, sum aftur og aftur spældi sær vi› bóltinum, økti undan hvíldini til 3–1. Hann lobba›i upp um málverjan.

Í 2. hálvleiki var› Ey›un Gullok Svalbard rikin av vøllinum fyri ófantaliga takling. Fram ímóti dystarenda skora›i KÍ tvey mál afturat. Jóhannes Færø skora›i ta› fyrra, eftir tvørbólt í brotsteiginum, og Frí›in Ziskason stúta›i ta› seinna eftir hornaspark.

jh

KÍ–TB 5–1 (3–1)
0–1: Bogi Johannesen
1–1: Allan Joensen
2–1: Allan Joensen
3–1: Tomislav Sivic
4–1: Jóhannes Færø
5–1: Frí›in Ziskason

Allan Joensen gjørdi tey bæ›i fyrstu málini hjá næstbesta KÍ li›num